## Temakvøld

**um Ítróttar- og kappingarpsykologi**

TEMAKVØLD
*Tíðindaskriv*

Temakvøld verður í róðrarneystinum hjá NSÍ á Glyvrum 20. mai um ítróttar- og kappingarpsykologi. Øll ítróttarfólk kunnu luttaka uttan mun til støði og ítróttargrein. Uppleggshaldari verður Jørn Ravnholt frá Danmarks Idræts forbund, sum hevur undirvíst á meiri enn 200 skeiðum um ítróttarsálarfrøði. Hann hevur verið ráðgevi hjá meiri enn 30 donskum landsliðum í flestu ítróttargreinum, m. a. donsku hondbóltsgullgentunum undan EM-sigrinum í 2002.

## Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag aðalfund

LURTARAFELAG
*Tíðindaskriv*

Aðalfundurin hjá Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag, KLH, verður Kristi himmalsferðardag 20. mai 2004 kl. 14.00 í Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum.
KLH er ópolitiskt og endamálið hjá felagnum er at virka fyri kristiligum sendingum í almenna útvarpinum og sjónvarpinum, og at styðja útvarpið og sjónvarpið í góðum og sømiligum sendingum. KLH vil forða fyri, at útvarpið og sjónvarpið verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, sum ikki er kristnum siði og kristnari trúgv verdugt. KLH ger ikki tilfar at senda í útvarpi og sjónvarpi, men vil verja, økja og styrkja um kristiliga tilfarið í almennu fjølmiðlunum.
Í sambandi við aðalfundin verður eisini alment møti í Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum kl. 18.00, har øll eru vælkomin.

# Hevði verið stuttligt at verið prinsessa

**Joan, Berit og Ann halda, at Fríðrikur og Mary, vóru eitt ógvuliga fitt brúðarpar**

BRÚDLEYP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tær tríggjar, sum dagliga starvast á verkhúsinum, Stíggi í Saltangará, Joan Olsen, Berit Abrahamsen og Ann í Puntabyrgi, eru samdar um, at tað var ógvuliga áhugavert at fylgja sendingunum í SvF fríggjadagin, tá ið krúnprinsurin, Fríðrikur og Mary, skuldu giftast.

Tær hugdu tað mesta av fyrrapartinum, og til Stíggjur læt aftur seinnapartin. Meðan tær koyrdu heim, royndu tær eisini at hyggja í bussinum.

– Men signalið var so vánaligt hendan dagin, at vit sóu ikki so væl, siga tær.



*– Jú, tað hevði verið stuttligt at verið ein prinsessa, eru tær tríggjar, Joan, Berit og Ann, samdar um.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Hugdu heima

Berit sigur, at so skjótt, hon kom heim á Strendur, setti hon seg aftur at hyggja í sjónvarp, og heima við hús hugdi hon saman við mammu síni og mostur síni.

Bæði Joan, Berit og Ann sóu sjálva brúðarvígsluna hendan dagin, og tær vóru ógvuliga hugtiknar av øllum tí, sum fór fram.

Tær halda allar tríggjar, at Mary var ógvuliga søt, og tær vóru hugtiknar av hennara vakra brúðarkjóla og langa slørinum. At kjólin er gamal, hildu tær var við til at gera hann uppaftur vakrari og meira áhugaverdan.

### Prinsessur

Spurdar, hvat tær hildu um Fríðrik, siga tær við ein munn:

– Jú, hann var eisini ógvuliga vakur og søtur.

Tær eru samdar um, at Fríðrikur og Mary vóru eitt ógvuliga fitt brúðarpar.

Tá ið vit spurdu tær, Joan, Berit og Ann, um kundu hugsað sær at verið prinsessur, yppa tær í fyrsta lagi øksl. Men so eru tær samdar um, at tað hevði nú verið stuttligt.

– Jú, jú. Tað hevði nú verið nokso stuttligt at verið ein prinsessa. Men tað hevði helst verið ógvuliga strævið, eru tær samdar um.

# Bjargaði sær uppá land

**Leygarkvøldið sigldi ein bátur á land á Glyvursnesi. Maðurin, sum var einsamallur í bátinum, bjargaði sær uppá land við egnari hjálp**

SJÓFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið um gott 20-tíðina fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at 13 tons stóri føroyskt bygdi báturin, Skorðhamar, hevði siglt á land á Glyvursnesi.

– Tá ið vit fingu boðini frá Alarmsentralinum, hevði maðurin, sum var einsamallur í bátinum, bjargað sær uppá land. Vit boðaðu MRCC Tórshavn frá tilburðinum, og eftir at vit høvdu havt samband við mannin, koyrdu út á Glyvursnes.

Løgreglan sigur, at maðurin var hampiliga væl fyri, tá ið teir komu út á Glyvursnes, men fyri tryggleikans skuld, bóðu vit hann hyggja fram við á skaðastovuni.

– Hann var vátur, men sá ikki út til at hava fingið nakað mein.

Løgeglan sigur, at maðurin var á veg úr Vágunum til Havnar við bátinum. Hann var farin úr Vágunum seinnapartin leygardagin, og tilburðurin hevði einki við bátastevnuna í Vestmanna at gera.

– Maðurin var ikki ávirkaður, men hugsandi er, at hann er sovnaður.

Løgreglan sigur, at báturin hevði ikki fingið nakran sjónligan skaða og eftir hendingina, sleipaði ein annar bátur, sum kom framvið, Skorðhamar til Havnar.

# Stíggjur hevði suppu til brúdleypið

**Á verkhúsinum, Stíggi í Saltangará, gjørdu tey eitt sindur burtur úr fríggjadegnum, sum var dagurin, tá ið krúnprinsurin, Fríðrikur og Mary, giftust**

BRÚDLEYP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ann í Puntabyrgi, sum er úr Havn og Berit Abrahamsen, sum er av Strondum, høvdu stóran áhuga í kongaliga brúdleypinum.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sigvør Nesá, sum starvast á Stíggi, sigur, at allir brúkararnir, sum høvdu hug til tess, sluppu at hyggja í sjónvarp í kantinuni hendan dagin. Tey, sum ikki tímdu ella høvdu minni áhuga fyri tí, sum SvF sendi, vóru til arbeiðis á verkstaðnum.

– Tað vóru nøkur, sum hugdu tað mesta av degnum, meðan tey vóru her hjá okkum. Onnur, sum høvdu minni áhuga ella ikki fataðu so nógv av tí, ið fór fram, vóru til arbeiðis.

### Suppa og køkur

Sigvør sigur, at á middegi fríggjadagin høvdu tey suppu, kaffi og góðar køkur í samband við dagin, men longu klokkan 13.30 var dagurin á Stíggi liðugur.

Tað er nevniliga soleiðis, at fríggjadagurin er stytri enn hinir dagarnir í vikuni.

Sigvør Nesá sigur, at sum hon hevur skilt, hildu tey, sum vildu síggja sjálva vígsluna og sendingarnar annars, fram at hyggja heima við hús.

– Jú, hetta var ein hugnaligur dagur her hjá okkum, sigur hon.

Brúkararnir á Stíggi eru um 20 í tali, og ein vanligan dag, eru 5 fólk til arbeiðis.





petur & petur • 320870